# Vegleiðing fyri fosturforeldur

Barnaverndarstova Føroya

Mai 2016

## Góðu fosturforeldur

Endamálið við hesum tilfari er at geva tykkum eina skrivliga kunning um ymisk viðurskifti, ið hava við uppgávuna sum fosturforeldur at gera.

Fosturforeldraskipanin fæst serliga við at finna fosturforeldur og at góðkenna tey, umframt at vit skipa fyri skeiðum, vegleiða og fylgja við, hvussu tað gongst hjá fosturforeldrunum. Vit vitja við millumbilum í hvørjum einstøkum fosturheimi fyri at tryggja, at umstøðurnar framvegis eru í lagi. Kannað verður, um broytingar eru í bústaðarviðurskiftum, fíggjarviðurskiftum, heilsuviðurskiftum, ella um aðrar broytingar eru farnar fram, sum á ein ella annan hátt broyta fortreytirnar fyri leikluti tykkara sum fosturforeldur.

Barnaverndartænasturnar kring landið hava ábyrgd av hvørji einstakari fyriskipan og framhaldandi viðgerð av málinum. Tær fylgja tí væl við, um barnið trívist og mennist, meðan tað er sett heiman, og vitja tvær ferðir árliga í fosturheiminum, har samrøður eisini eru við barnið.

Tá eitt fosturbarn flytir inn, ávirkar hetta sjálvsagt tilveruna hjá teimum, ið eru í húsi og viðurskiftini teirra millum, bæði foreldur og børn teirra. Fosturbørn hava serligan tørv á tøttum sambandi og nærveru í sínum nýggja heimi. Hesi børn eru jú sum húsfólk og luttaka í øllum lívsins viðurskiftum saman við familjuni. Øll í húsinum mugu tí taka barnið til sín og hugsa um framtíðina, tí eisini tá barnið er vorðið vaksið, fer tað at fylgjast við teimum á lívsleiðini. Tað er sostatt bæði ein stór og ein bindandi uppgáva at taka eitt barn til sín, og at geva tí hjartarúm.

Foreldrini at barninum varðveita *foreldramyndugleikan*, tó at barnið býr í einum fosturheimi. Tað er tí ein sera umráðandi førleiki at hava góð samstarvsevni í mun til foreldrini, eins í samstarvinum við barnaverndartænastuna, sum hevur ábyrgd av hvørji einstakari fyriskipan.

Vit á Barnaverndarstovuni eru takksom fyri allar tær familjur, sum eiga styrkina at gera mun fyri børnum í eini sperdari støðu, og sum vilja bjóða hesum børnum eitt gott heim i eitt styttri ella longri tíðarskeið.

Við ynski um gott samstarv.

**Barnaverndarstova Føroya**

# Innihaldsyvirlit


Góðu fosturforeldur ........ 2

1) Alment ........ 5

Til fosturs ........ 5

Umlætting ........ 5

Ætlan ........ 5

Samstarv við foreldrini ........ 5

Samveran hjá barninum við foreldrini ........ 6

Umlætting til fosturforeldur ........ 6

Inntøkur hjá barninum, ið er sett heiman ........ 7

Fosturforeldrini verða sett inn í málið ........ 7

Bráðfeingis trupulleikar ........ 7

2) Avtala verður gjørd við fosturforeldur ........ 8

Góðkenning ........ 8

Samstarvsavtala ........ 8

Samsýning ........ 8

Frítíðarløn og eftirløn ........ 9

Skattaviðurskifti ........ 10

Frítíð ........ 10

Sjúka ........ 10

3) Fíggjarlig viðurskifti meðan eitt barn er í fosturheimi ........ 11

Vistarhald og klæði ........ 11

Útreiðslur til lummapening, ansing, skúla og viðgerð ........ 11

Aðrar útreiðslur ........ 12

4) Meðan barnið er sett heiman ella í umlætting ........ 15

Eftirlit ........ 15

Samrøða við fosturforeldrini ........ 15

Barnasamrøða ........ 15

Royking ........ 15

Flyting ........ 15

Pass ........ 16

Dagstovnur og skúli ........ 16

Teldurpostur og tryggleiki ........ 16

Myndatøka, samrøður, internet og annað ........ 17

Almenn umrøða ella atfinningar ..... 17
Myndugleiki og førleikar hjá fosturforeldrum ..... 17
Tryggingarviðurskifti ..... 18
5) Krøv sum heild til fosturforeldur ..... 19
Tagnarskylda ..... 19
Fráboðanarskylda ..... 19
Valdsnýtsla ..... 19
Vegleiðing og supervisión ..... 20
Skeið og kunnandi tiltøk fyri fosturforeldur ..... 20
Eftirlit sum heild ..... 21
Uppathald ..... 21

# 1) Alment

## Til fosturs

Sambært galdandi lóggávu kunnu børn og ung verða sett heiman, tá hetta er best fyri barnið, og tá ið fyribyrgjandi fyriskipanirnar ikki verða mettar at geva eitt nøktandi úrslit.

Eitt barn kann verða sett heiman við ella uttan samtykki foreldranna. Tá eitt barn flytir inn til tykkum sum fosturforeldur, eru tað tit, sum hava dagligu umsorganina um hendi.

## Umlætting

Sambært § 15 í barnaverndarlógini kunnu foreldur, ið vanliga hava eitt gott samband við barnið, men sum ikki hava orku til at ansa barninum alla tíðina, fáa tilboð um umlætting. Hetta merkir, at fosturforeldur hava barnið búgvandi hjá sær nøkur samdøgur hvønn mánaða – vanliga í vikuskiftum, men talan kann eisini vera um gerandisdagar.

Bert foreldur, sum ikki hava møguleika fyri at fáa børn síni ansað hjá ommum og abbum ella øðrum næstringum, fáa tilboð um umlætting sambært hesi skipan. Talan kann eisini vera um stakar uppihaldarar, ið tørva umlætting av og á, fyri at megna dagligu uppgávuna sum foreldur.

## Ætlan

Áðrenn eitt barn verður sett heiman ella til umlættingar, ger málsviðgerin í barnaverndar-tænastuni eina skrivliga ætlan, har lýst verður nærri, hvat tit sum fosturforeldrini skulu leggja serligan dent á.

Tá tit vilja taka eitt barn til fosturs ella í umlætting, játta tit samstundis at fylgja hesi skrivligu ætlanini.

Skrivliga ætlanin verður eftirmett í sambandi við uppfylgjan í málinum sambært § 16 í barna-verndarlógini.

## Samstarv við foreldrini

Tað er av sera stórum týdningi, at tað er gott samband millum foreldrini og fosturforeldrini. Leikluturin sum fosturforeldur krevur góð samstarvsevni og stórt tolsemi, umframt at vísa fyrilit fyri viðbreknu støðuni, sum foreldrini eru í.

Meðan barnið er sett heiman hava foreldrini framvegis *foreldramyndugleikan*, og tey skulu í mest møguligan mun eiga lut í teimum avgerðum, sum verða tiknar um teirra barn. Hetta kann eitt nú gera seg galdandi í sambandi við skúlagongd, sjúku, lækna og møguliga viðgerð. Í hvørjum einstøkum máli eigur at vera greitt, hvussu nógv foreldrini verða tikin við í hvørjum einstøkum spurningi.

Tað er málsviðgerin í barnaverndartænastuni, sum sær til, at greiðar avtalur eru um hetta.

## Samveran hjá barninum við foreldrini

Tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, sum eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini ásetir samveruna millum barnið, foreldrini og møguliga onnur næstrafólk, meðan barnið er sett heiman.

Foreldrini og fosturforeldrini verða altíð hoyrd, áðrenn avgerð verður tikin. Eisini barnið verður hoyrt, um tess menning og búning loyvir tí, og um tað er til frama fyri barnið. Er barnið fylt 12 ár, skal tað altíð verða hoyrt.

Vanliga er samveran heima hjá foreldrunum, men viðhvørt kunnu umstøðurnar laga seg soleiðis, at hetta ikki ber til. Tá so er, kann samveran vera undir eftirliti sambært § 22, stk. 4 í lógini, og tá kann samveran fram fram hjá tykkum sum fosturforeldrum ella aðra staðni, har fosturforeldrini møguliga eru við.

Tað ber eisini til at skipa samveruna soleiðis, at eitt uttanveltað fólk stuðlar upp undir hana. Mett verður í hvørjum einstøkum føri um, hvat er best fyri barnið, eins og fyri samstarvið millum fosturforeldrini og foreldrini.

Um tað verður avgjørt, at samveran skal fara fram undir eftirliti, er tað altíð eitt uttanveltað fólk, sum hevur eftirlitið.

## Umlætting til fosturforeldur

Sum fosturforeldur kunnu tit ikki seta onnur fólk til at taka sær av barninum, um sæð verður burtur frá vanligum tørvi á barnagentu, eitt nú tá tey skulu á foreldrafund ella til ymisk onnur tiltøk, ið hoyra gerandisdegnum til. Um tit eru burturstødd í styttri tíð, og barnið tá heldur til hjá øðrum fólki, eigur Barnaverndartænastan at fáa boð um hetta.

Í serligum førum kann umlætting játtast tykkum, um barnið t.d. ikki kann fara við tykkum at ferðast, ella um tað ikki kann fara til samveru heima hjá foreldrunum. Um skipað umlætting er í hesum sambandi, verður hon mótroknað í samsýningini til tykkum dag fyri dag.

## Inntøkur hjá barninum, ið er sett heiman

Barnið kann hava eina inntøku av ymsum arbeiði í síni frítíð, uttan at hetta verður mótroknað í lummapeninginum.

## Fosturforeldrini verða sett inn í málið

Tá ið Fosturforeldraskipanin hevur fingið áheitan frá eini barnaverndartænastu, um at finna hóskandi fosturheim til eitt ávíst barn, setir hon seg í samband við eina fosturfamilju, um tey vilja átaka sær uppgávuna. Um hetta er í lagi, verður avtala gjørd, og avvarðandi barnaverndartænasta og Fosturforeldraskipanin vitja heima hjá fosturforeldrunum saman við foreldrunum. Tey verða tá sett inn í støðuna hjá barninum, sum eftir ætlan skal búgva hjá teimum. Eisini verður komið inn á, hvussu júst tey sum fosturforeldur kunnu taka sær av barninum og hvat væntað verður av teimum.

Tað er sera umráðandi fyri komandi sambandið millum foreldur og fosturforeldur, at foreldrini halda fosturheimið vera rætta staðið fyri barn teirra. Tá hetta er gjørt, vitjar barnið heima hjá fosturforeldrunum saman við foreldrum sínum og barnaverndaverndartænastuni. Um serligar umstøður tala fyri tí, kann Fosturforeldraskipanin eisini taka lut.

Ein ætlan verður gjørt fyri, hvussu fosturforeldrini skulu taka ímóti barninum við støði tí tørvi, sum tað hevur. Tað er avvarðandi barnaverndartænasta, sum ger hesa hesa ætlan saman við fosturforeldrunum og foreldrunum.

Roynt verður í mestan mun at sleppa undan bráðfeingis avgerðum, men tær kunnu koma fyri. Tá so er, ber eyðsæð ikki til at skipa innleiðsluna soleiðis, sum er lýst omanfyri, men umráðandi er altíð at vísa fyrilit fyri barninum.

## Bráðfeingis trupulleikar

Um tyngjandi trupulleikar knappliga taka seg upp, eitt nú um barnið rýmir úr fosturheiminum, um foreldrini krevja barnið heimaftur, ella um foreldur eru ávirkað av rúsdrekka, tá tey koma eftir barninum til samveru, eiga tit at seta tykkum í samband við avvarðandi barnaverndartænastu, sum altíð er tøk. Fosturforeldraskipanin skal eisini kunnast um hendingina.

## 2) Avtala verður gjørd við fosturforeldur

### Góðkenning

Fosturforeldraskipanin góðkennir tvey sløg av fosturforeldrum sambært § 27 í barnaverndarlógini: 1) Fólk, ið eru næstringar at barninum og onnur, sum hava tætt samband við barnið, og 2) vanlig fosturforeldur. Barnaverndartænastan ger tilmæli um næstringar og onnur, ið standa barninum nær. Í slíkum førum verður góðkenningin givin við atliti at ávísa barninum.

Góðkenning av næstringum og vanligum fosturforeldrum fer fram við støði í ávikavist 3.5 og 3.6 í *Leiðreglum í sambandi við, at børn vera sett til fosturs ella umlætting*.

Góðkenningin er grundað á eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri.

Tit verða góðkend sum fosturforeldur, um tit hava teir førleikar, ið skulu til. Her verður serliga hugsað um, at tit skulu kunna taka við teirri avbjóðing, ið eitt fosturbarn vanliga hevur við sær. Tit skulu hava neyðug umsorganarevni og foreldraførleika og møguligar royndir sum góðir uppalarar.

Í sambandi við góðkenningina skulu tit bæði sum fosturforeldur taka lut á einum kravdum grundskeiði.

Mett verður javnan um góðkenningina av fosturforeldrum.

### Samstarvsavtala

Ein skrivlig samstarvsavtala verður gjørd millum Fosturforeldraskipanina, avvarðandi barnaverndartænastu og tykkum, har ásett er nærri um fyriskipanina fyri barnið.

Samstarvsavtalan verður sum meginregla endurskoðað sambært 6.1 í *Leiðreglum í sambandi við, at børn vera sett til fosturs ella umlætting*, um annað ikki er avtalað.

### Samsýning

Sum fosturforeldur fáa tit ikki løn, men eina samsýning, sum er skattskyldug, og sum lógarásett gjøld (ALS 1,25%, Barsilsgjald 0.81% og Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald 2,25%) eisini verða rindað av. Umframt samsýningina fáa tit eina upphædd til vistarhald og klæði til barnið, umframt eitt fast gjald til lummapening til barnið, sí s. 11-12.

*Samsýningin* verður ásett eftir eini heildarmeting av eitt nú:

- støðuni hjá barninum og tørvinum á stuðli
- uppgávunum hjá fosturfamiljuni í mun til barnið
- møguligum kravi um samstarv við foreldrini

Samsýningin, upphædd til vistarhald og klæði til barnið  og lummapeningur til barnið er upprunaliga ásett í kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 um samsýning til fosturforeldur, og verður dagførd við jøvnum millumbilum. Hetta er galdandi frá 1. januar 2016: Samsýning (skattskyldug) pr. mðr.: (kr.  120,06 x 365 dg) : 12 mðr = kr.  3.651,83. Um samsýningin verður faldað 7 ferðir, er hon (3.651,83 x 7)= kr. 25.562,81. Sí annars fylgiskjal 4 í *Leiðreglur í sambandi við, at børn vera sett til fosturs ella umlætting*.

Ein vegleiðandi talva verður nýtt til áseting av samsýningini, ið liggur sum skjal til áðurnevndu leiðreglur. Tað er ikki ásett við lóg ella kunngerð, hvussu stóra samsýning ein fosturfamilja kann fáa, um hon hevur fleiri børn til fosturs. Tað verður altíð gjørd ein heildarmeting í mun til ta einstøku familjuna, hvussu nógv børn, eitt fosturheim megnar at hava, og hvussu tað verður samsýnt fyri hvørt barnið sær.

Er barnið sum børn flest í sama aldri, og samskiftið við foreldrini ikki er trupult, verður samsýningin sum útgangsstøði faldað við 1. Í tann mun, at tyngjandi ábendingar eru um tørv á stuðuli og víttfevnandi umsorgan, verður samsýningin hækkað. Samsýningin verður tó í *mesta lagi* faldað við 7 fyri ávísa barnið. Tá verður uppgávan sum oftast hildin at vera so mikið krevjandi, at annað av fosturforeldrunum má vera um barnið fulla tíð.

Samsýningin verður javnan endurskoðað meðan barnið er til fosturs, so hon til eina og hvørja tíð er í hóskandi samsvari við uppgávuna sum fosturforeldur. Hetta kann merkja, at jú betri barnið trívist og mennist, jú minni verða krøvini til tykkum – og jú minni verður samsýningin.

Í heilt serligum førum, tá fosturforeldur hava tørv á umlætting til fosturbørnini, verður annað fosturheim nýtt til hetta endamál. Samsýningin til fosturfamiljuna verður tá lækkað samsvarandi fyri hvørt samdøgur, barnið er í umlætting.

Tá talan er um umlætting, verður samsýningin vanliga ikki faldað við minni enn 3.

## Frítíðarløn og eftirløn

Goldin verður ikki frítíðarløn til fosturforeldur, ei heldur til eftirløn.

Sostatt mugu tit sum fosturforeldur sjálvi seta tað til síðis, sum tit meta tykkum hava tørv á til hesi endamál.

## Skattaviðurskifti

Upphæddin, sum tit fáa til vistarhald og klæði til barnið, er ikki skattskyldug. Endurgjald fyri koyring – um hetta er avtalað – er heldur ikki skattskyldugt.

Samsýningin, ið latin verður tykkum sambært samstarvsavtaluni, er hin vegin skattskyldug, eins og vanlig løn.

Lummapeningurin til barnið verður sett inn á kontu hjá fosturforeldrunum, *har p-talið hjá barninum er tilskilað*. Lummapeningurin verður flutt sum vanlig A-inntøka, og er sostatt skattskyldugur.

## Frítíð

Fosturforeldur eru saman við barninum dag og dagliga alt árið. Tá talan er um tíðarskeið, har hildið verður frí – summarfrí og frítíð í sambandi við høgtíðir – verður gingið eftir avgerðini um samveru millum barnið og foreldrini, sum Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur ásett.

Hetta merkir, at um samvera við foreldrini ikki er sett at verða í omanfyri nevndu tíðarskeiðum, tá hildið verður frí, heldur barnið frí saman við tykkum.

## Sjúka

Barnið, sum er til fosturs, er javnsett við hini húsfólkini. Tað ber tískil ikki til at avtala, at barnið ikki skal vera har í sambandi við barnsburð ella sjúku. Ei heldur er tað í samsvari við tørvin hjá barninum og við ta ætlan, sum er løgd, at barnið verður tikið út, tí fosturmamman er við barn, ella tí annað av fosturforeldrunum er vorðið sjúkt.

Um barnið gerst sjúkt verður væntað, at tit loysa henda trupulleika, eisini um hetta hevur fráveru við sær á arbeiðsplássi teirra. Um frávera á arbeiðsplássinum stendst av sjúkum barni, eru somu sømdir galdandi fyri fosturforeldur sum fyri foreldur annars, sí § 3, stk. 5 í Løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.

# 3) Fíggjarlig viðurskifti meðan eitt barn er í fosturheimi

## Vistarhald og klæði

Umframt samsýningina fáa tit sum fosturforeldur eina upphædd til vistarhald og klæði til barnið. Henda upphædd er at rokna sum endurgjald fyri allar vanligar útreiðslur í sambandi við uppihaldið hjá barninum. Upphæddin kann samanberast við tær útreiðslur, sum tit vanliga hava av tykkara egnu børnum. T.d. verður tað mett sum rímiligt, at tit av hesi veiting seta eina ávísa mánaðarliga upphædd av til summarfrítíðina hjá barninum. Upphæddin verður javnan dagførd.

Vanligar útreiðslur í sambandi við dagliga tørvin eru til eitt nú:

- Mat
- Innivist (kamar, song, borð, stólur, seingjarklæði, vatn, ljós, hiti)
- Klæði
- Internetsamband, telefon, fartelefon og sjónvarp
- Viðlíkahald av kamarinum
- Klædnavask, íroknað vaskievni
- Heilivágur, sum lækni ikki hevur útskrivað, koppseting í sambandi við uttanlandsferðir
- Reinføri (sápa, blæur, krem, deodorantur, mánasjúkubind)
- Hárfríðkan
- Gávur til fosturbarnið í sambandi við føðingardag og jól og til floksfelagar
- Umvælingar av súkklu
- Skúlaamboð (taska, pennahús, lineal, spannari, lummaroknari o.t.)
- Nýtsla av fartelefon, teldu og interneti v.m.
- Postgjald fyri brøv, sum barnið sendir
- Busskort til barnið til skúla og frítíðarvirksemi
- Koyring til dagstovn, skúla, lækna, tannlækna, vinfólk, frítíðarvirksemi
- Samansparing til frítíðarferðir og seturskúla, ferming, veitslur v.m.
- Gjøld, bøtur
- Pass

Omanfyri standandi eru dømi, og tískil kunnu aðrar útreiðslur eisini koma fyri.

## Útreiðslur til lummapening, ansing, skúla og viðgerð

Lummapeningur til barnið verður fluttur hvønn mánaða á kontu hjá fosturforeldrunum, har p-talið  hjá barninum er tilskilað. Henda upphædd er sambært *Kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 um samsýning til fosturforeldur*, og verður javnað árliga við *Kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum.*

Dagstovnur: Barnaverndartænastan í økinum, har foreldramyndugleikin býr, rindar foreldragjaldið og kommunupartin sambært avtaluni.

Skúli: Um barnið er til fosturs í aðrari kommunu, enn har foreldramyndgleikin býr, rindar avvarðandi barnaverndartænasta skúlagjaldið.

Viðgerð: Vanliga rindar barnaverndartænastan fyri viðgerð, sum barnið fær, t.d. sálarfrøðing, fysioterapi o.a. Slíka viðgerð skal barnaverndartænastan játta, áðrenn hon verður sett í verk.

## Aðrar útreiðslur

Tit kunnu, umframt samsýningina, vistarhald v.m., sum eru nevnd í samstarvsavtaluni, eisini fáa stuðul fyri aðrar útreiðslur. Hetta verður gjørt eftir umsókn, sum tit senda til barnaverndartænastuna, ið hevur ábyrgdina av barninum. Upphæddin til vistarhald v.m. eigur í mestan mun at vera hugsað til nýtslu fyri alt árið, so at hon kann røkka til ymiskar merkisdagar, frítíð og annað.

Niðanfyri eru nøkur dømi um, hvat søkjast kann um, um tað skuldi borið so á, at upphæddin til vistarhald v.m. ikki røkkur til.

**Útbúnaður**

Tá barnið av fyrstan tíð fer til fosturs, kunnu tit fáa eina upphædd til útbúnað í sambandi við fosturuppihaldið. Upphæddin er ásett í kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 og verður javnan dagførd.

**Koyring**

Endurgjald verður ikki veitt til vanliga koyring, sum til dømis í barnagarð ella skúla, til lækna, frítíðarítriv og vanligar útferðir v.m. Endurgjald kann tó veitast eftir galdandi reglum um koyripening, um tit, eftir áheitan frá barnaverndartænastuni, hjálpa til við flutninginum, tá barnið hevur samveru við sína egnu familju, og tá barnið skal til serliga viðgerð ella til serligan stovn ella skúla uttan fyri bústaðarkommununa.

Er talan um umlætting, verður endurgjald fyri koyring vanliga bert latin í sambandi við heintan og handan av barninum.

**Frítíðarítriv**

Meginreglan er, at upphæddin til vistarhald og klæði eisini skal brúkast til frítíðarítriv hjá barninum. Hevur barnið serligan tørv, sum ger, at neyðugt er við ávísum ítrivi umframt tað vanliga, kann tó søkjast um stuðul til hetta hjá barnaverndartænastuni.

Í umlættingarmálum verður stuðul ikki veittur til frítíðarítriv.

**Gávur, klæði og heilivágur v.m.**

Stuðul verður ikki latin til gávur og klæði, sum fosturforeldrini keypa. Hetta verður roknað sum partur av vistarhaldinum.

Vanligur heilivágur skal somuleiðis gjaldast av vistarhaldinum. Hevur barnið tørv á serliga dýrum heilivági, ið bara verður útflýggjaður eftir ávísing, men sum Heilsutrygd ikki letur stuðul til, kunnu tit søkja um stuðul til hetta. Í ávísum førum kann eisini søkjast um stuðul til rindan av egingjaldinum til heilivágin. Tá talan er um brillur, kann eisini søkjast um stuðul, um slíkur ikki fæst frá Heilsutrygd.

**Dópur, ferming og annað líknandi veitsluhald**

Roknað verður við, at tit rinda ein part av teimum útreiðslum, sum standast av barnadópi, ferming ella líknandi veitsluhaldi fyri fosturbarninum av samsýningini fyri vistarhald og klæði.

Um tað ikki ber til at spara upp til ferming ella líknandi veitsluhald fyri fosturbarninum av samsýningini fyri vistarhald og klæði, ber til at søkja um ískoytisstuðul til endamálið hjá barnaverndartænastuni, tó í mesta lagi 7 tús. kr.

Umlættingarfamiljur kunnu ikki fáa stuðul til útreiðslur í sambandi við dóp, ferming ella líknandi veitsluhald.

**Ferðaískoyti**

Í *serligum førum* kann barnaverndartænastan eftir umsókn gera av, at veita ískoyti til ferðaútreiðslur til barnið. Stuðulin verður altíð latin sambært eini ítøkiligari lýsing av veruligu útreiðslunum. Til dømis prísinum á ferðaseðlinum hjá barninum. Stuðulin kann í mesta lagi vera 7 tús. kr. í hvørjum einstøkum føri.

**Fosturbørn við likamligum ella sálarligum breki, sum eru fevnd av § 17 í Forsorgarlógini**

Um barnið er sett til fosturs, er tað at meta sum heimabúgvandi, og lýkur tískil treytirnar at koma undir hesa lógargrein. Fosturfamiljan hevur sambært leiðbeining frá Almannaverkinum rætt til at søkja um endurgjald fyri meirútreiðslur, sum standast av hesum:

Hevur barnið álvarsliga sjúku, er møguligt at fáa sjúkradagpening, um tit mugu fara frá arbeiði og missa inntøku í tí sambandi. Treytin er, at talan er um álvarsligan heilsuvanda ella vandi er fyri lívinum hjá barninum.

Hevur barnið vanliga sjúku í styttri tíð, eitt nú krím, oyrnastingir, lungnabruna, beinbrot, vanligu barnasjúkurnar o.t., er møguleikin fyri fíggjarligari hjálp frá tí almenna avmarkaður. Nakrir sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum geva foreldrum rætt til at vera heima hjá sjúkum barni eitt ávíst dagatal. Hevur tú ikki henda møguleika, kann álitið vera familja ella aðrir kenningar. Um tað ikki røkkur og frávera frá arbeiði hevur við sær, at familjan kemur í fíggjarliga trongstøðu og ikki er før fyri at útvega tað neyðuga til uppihalds, kann uppihaldshjálp veitast eftir forsorgarlógini.

Hevur ein familja meirútreiðslur av at uppihalda barni, sum ber likamligt ella sálarligt brek ella hevur varandi sjúku, so kann stuðul verða veittur til meirútreiðslur, sum verða mettar neyðugar. Sum dømi kunnu nevnast útreiðslur av

- serligum kosti
- serligum skeiði um uppaling, samskifti, røkt o.l.
- flutningi
- óvanligum sliti av klæðum
- blæum og líknandi

Sí nærri á http://av.fo/default.asp?menu=398 og http://av.fo/default.asp?menu=399

## 4) Meðan barnið er sett heiman ella í umlætting

### Eftirlit

Avvarðandi barnaverndartænasta hevur eftirlit við teimum børnum, ið antin eru í fosturheimi ella til umlættingar.

Fosturforeldraskipanin hevur umsjón við fosturheiminum og vitjar javnan hvørt einstakt fosturheim. Um ivamál stinga seg upp, og tørvur er á ráðgeving, eiga tit at seta tykkum í samband við Fosturforeldraskipanina.

### Samrøða við fosturforeldrini

Í sambandi við endurskoðanina av málinum tosar barnaverndartænastan við tykkum um støðuna hjá barninum, sæð í mun til ætlanina.

### Barnasamrøða

Barnaverndartænastan tosar í minsta lagi tvær ferðir um árið við barnið, sum er til fosturs, og er - í tann mun tað ber til - tveyeini við barnið. Hetta verður gjørt, tá ætlanin fyri barnið verður fylgd upp.

### Royking

Væntað verður, at børn, sum eru sett heiman, búgva í einum roykfríum umhvørvi. Um onkur í húskinum roykir, eigur hetta at verða gjørt uttandura.

Hesar ásetingar um royking eru einans gjørdar til tess at sleppa undan teimum skaðiligu árinum, ið royking hevur við sær.

### Flyting

Børn, ið verða sett heiman, skulu skrásetast sum búgvandi hjá fosturforeldrunum. Barna-verndarverndartænastan tekur sær av hesum, eins og møguligari skúlaflyting, lækna, heilsufrøðingi o.t.

## Pass

Vanliga er tað *foreldramyndugleikin*, sum skrivar undir, tá søkt verður um pass til eitt barn – eisini tá barnið er umsorganaryvirtikið.

Um tað skuldi hent, at foreldramyndugleikin sýtir fyri at skriva undir umsóknina um pass, hevur avvarðandi barnaverndartænasta tó møguleikan at søkja Føroya landfúta um pass til barnið.

Fosturforeldur, ið skulu ferðast við barninum, og sum tískil hava tørv á einum passi, eiga at venda sær til barnaverndartænastuna, ið tekur spurningin upp við foreldrini.

## Dagstovnur og skúli

Tá barnið skal hava pláss á dagstovni ella skrivast inn í skúla, skulu tit sum fosturforeldur syrgja fyri hesum. Umráðandi er tó, at hetta fer fram í samráð við foreldrini at barninum og við avvarðandi barnaverndartænastu.

## Teldupostur og tryggleiki

Viðkvæmir upplýsingar og persónsupplýsingar um eitt barn mugu ikki sendast umvegis teldupost.

Viðkvæmir upplýsingar eru t.d.:

- Upplýsingar um heilsustøðu og møguligt misbrúk
- Upplýsingar um revsiverd viðurskifti
- Upplýsingar um innanhýsis viðurskifti í familjuni
- Upplýsingar um uppruna hjá barninum
- Upplýsingar um politisk og átrúnaðarlig viðurskifti
- Upplýsingar um kynslív

Persónsupplýsingar eru eitt nú p-tal og upplýsingar um fíggjarlig viðurskifti.

Víst verður annars til ásetingarnar í *Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum*, eins og til heimasíðuna hjá Dátueftirlitinum www.dat.fo

## Myndatøka, samrøður, internet og annað

Sama hvørt barnið er sett heiman ella til umlættingar, er tað barnaverndartænastan, sum hevur ábyrgd av barninum, tá tað tað býr hjá tykkum. Til hesa ábyrgd hoyrir skyldan at verja rættin hjá barninum. Í hesum sambandi má barnaverndartænastan tryggja sær, at tit sum fosturforeldur ikki fara út í almenna rúmið við myndum ella samrøðum við barnið, eitt nú á internetinum, sum kunnu skaða barnið ella foreldrini. Hetta merkir, at

- myndir av barninum bert kunnu nýtast til privata nýtslu
- barnið ikki skal kunna kennast aftur í ymsum ritum og faldarum
- barnið ikki má verða nevnt í sosialu miðlunum, eitt nú facebook

Foreldramyndugleikin skal geva sítt samtykki, um endamálið við myndunum er, at tær skulu gerast almennar.

## Almenn umrøða ella atfinningar

Um nakað hendir, sum kann hava almenna umrøðu ella atfinningar við sær, skulu tit beinanvegin venda tykkum til avvarðandi barnaverndartænastu og Fosturforeldraskipanina.

Um eitt barn, sum er sett heiman, rýmir úr fosturheiminum, skal hetta fráboðast beinanvegin (sí **Bráðfeingis trupulleikar**).

## Myndugleiki og førleikar hjá fosturforeldrum

Yvirskipaðu ábyrgdina av barni, sum er sett í fostur ella í umlætting, hevur avvarðandi barna-verndartænasta.

Tit hava dagligu ábyrgdina av barninum um hendi, meðan tað er hjá tykkum, bæði tá talan er um fostur og um umlætting.

Sum fosturforeldur hava tit ikki nakran sjálvstøðugan avgerðarmyndugleika yvir barninum. Talan er um umsorgan og uppaling, ið er ásett í samstarvsavtaluni.

Tað er avvarðandi barnaverndartænasta, sum hevur avgerðarmyndugleika yvir barninum – í góðum samstarvi við foreldrini at barninum. Hetta ger seg eitt nú galdandi í sambandi við, nær barnið fer á dagstovn, í skúla, um barnið skal til sernámsfrøðiliga ella sálarfrøðiliga kanning, hvussu samveran við foreldrini skal skipast, ella nær barnið ikki longur skal vera hjá tykkum.

Arbeitt verður sambært nøkrum førleikum, ið fosturforeldur skulu hava:

• At tit duga at uppala eitt barn og geva tí umsorgan

• At tit duga at skapa tilknýti til eitt barn, ið er grundað á nærveru og at tit eru góð við barnið. Eisini skulu tit virða rættin hjá barninum at vera uppií, tá avgerðir skulu takast

• At tit duga at virða og at stuðla sambandið millum barnið og familjuna

• At tit hava ein virkan leiklut saman øðrum fólki, ið eru um barnið

• At tit megna at varðveita sambandið við barnið fyri alt lívið

## Tryggingarviðurskifti

Tey, ið hava børn í **fostur**, skulu sjálvi tekna eina blandaða ábyrgdar- og vanlukkutrygging móti persónsskaðum, ið fosturbarnið elvir móti fosturfamiljuni ella triðja persóni, og móti skaðum, ið fosturbarnið elvir móti ogn ella lutum hjá triðja persóni.

Børn, sum eru til **umlætting**, eru tó ikki fevnd av tílíkari trygging. Barnaverndartænastan má tí tryggja sær, at foreldrini at børnum, ið eru í umlætting, sjálvi hava eina trygging, sum umfatar barnið.

## 5) Krøv sum heild til fosturforeldur

### Tagnarskylda

Sambært § 26 í Fyrisitingarlógini hava øll, sum eru í almennum starvi, tagnarskyldu. Brot á hesa skyldu verða revsað, samanber § 152 í revsilógini.

Tagnarskyldan merkir, at tit sum fosturforeldur ikki mugu bera víðari upplýsingar um barnið og um familjuna hjá tí. Sí annars **Teldurpostur og tryggleiki**.

Tagnarkyldan er framvegis galdandi aftaná, at barnið er farið úr fosturheiminum.

### Fráboðanarskylda

Í § 14, stk. 2 í barnaverndarlógini verður hetta sagt um *vanliga fráboðanarskyldu*:

"Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning, hevur skyldu til at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin."

Vanliga fráboðanskyldan er galdandi fyri allar borgarar.

Viðvíkjandi *herdu fráboðanarskylduni* er ásetingin henda:

"Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum."

Herda fráboðanarskyldan er eisini galdandi fyri fosturforeldur.

Herda fráboðanarskyldan ber sostatt við sær, at eisini tá talan bert er um ein varhuga, skulu tit boða barnaverndartænastuni frá.

### Valdsnýtsla

Tað er ikki loyvt at nýta vald mótvegis barninum, hvørki likamliga ella á ein niðurgerandi hátt at fara sálarliga út um mark. Ei heldur er loyvt at hava eftirlit við brøvum ella at avlurta telefonsamrøður hjá barninum.

Um vald verður nýtt, eisini tá talan er um neyðverju, skulu tit kunna barnaverndartænastuna og Fosturforeldraskipanina um hetta.

## Vegleiðing og supervisión

Fosturforeldraskipanin veitir tykkum stuðul og vegleiðing sum fosturforeldur. Tit kunnu somuleiðis eftir tørvi venda tykkum til Fosturforeldraskipanina fyri at fáa ráðgeving og supervisión. Hvør hósdagur er settur av til at veita fosturforeldrum einstaklinga supervisión, men sjálvsagt veita vit stuðul og ráð, tá tørvur annars er á tí.

Tá talan er um nýggj fosturmál, hevur Fosturforeldraskipanin eitt tætt og regluligt samskifti við fosturfamiljurnar fyri at stuðla teimum í uppgávuni sum fosturforeldur.

Miðað verður ímóti, at øll fosturforeldur fáa tvær stuðlandi vitjanir árliga, men í málum, har einhvør trupulleiki er, verður vitjað við styttri millumbilum. Hetta kann eitt nú gera seg galdandi, tá uppgávan kennist tyngjandi fyri fosturforeldrini, tí børnini, sum frammanundan eru í húsinum, ikki kunnu fáa eins nógva umsorgan sum áður.

Tað áliggur Fosturforeldraskipanini at stuðla og fyrireika tykkum sum fosturforeldur, áðrenn barnið verður latið tykkum, og um tørvur er á tí, geva tykkum stuðul, undirvísing og vegleiðing, meðan barnið er til fosturs. Í serligum førum kann hetta eisini verða gjørt eftir, at barnið er farið úr heimi tykkara.

Barnaverndartænastan hevur ábyrgdina av sjálvari fyriskipanini og hevur framhaldandi viðgerðina av málinum um hendi, og hevur tí ábyrgd av at veita tykkum ráðgeving og supervisión í mun til ætlanina og menningina hjá barninum.

## Skeið og kunnandi tiltøk fyri fosturforeldur

Tað er ein krevjandi uppgáva at vera fosturforeldur. Tí skipar Fosturforeldraskipanin regluliga fyri skeiðum og evniskvøldum. Vit vænta avgjørt, at tit taka lut í hesum tiltøkum, fyri at kunna røkja uppgávuna á ein nøktandi hátt.

Tit skulu í hesum sambandi luttaka á einum lógarkravdum skeiði um at vera fosturforeldur. Hetta skeið, sum varar í tveir dagar, verður hildið við jøvnum millumbilum.

Til ber ikki at søkja Fosturforeldraskipanina um luttøku á øðrum skeiðum enn teimum, sum hon sjálv skipar fyri.

## Eftirlit sum heild

Sum fosturforeldur, ið røkja eina uppgávu fyri Fosturforeldraskipanina, kunnu tit vænta, at vit vitja heima hjá tykkum við jøvnum millumbilum, har mett verður um, hvørt viðurskiftini framvegis eru í eini góðari legu, og sum eru sjálvt grundarlagið undir góðkenningini.

Tað er skylda at boða Fosturforeldraskipanini frá broytingum heima við hús, ið kunnu hava týdning fyri góðkenningina.

## Uppathald

At hava eitt barn til fosturs ella í umlætting kann vera galdandi í styttri ella longri tíð, men tó altíð í eina avmarkaða tíð. Í øllum førum endar tíðarskeiðið, tá endamálið við fyriskipanini er rokkið, ella tá barnið ikki longur er fevnt av barnaverndarlógini. Tað er eyðsæð, at tað ikki altíð er so lætt fyri fosturforeldur at lata barnið fara úr teirra heimi, einum barni, ið tey hava knýtt seg tætt til.

At eitt barn ikki longur er til fosturs nýtist tó ikki at merkja, at sambandið við fosturforeldrini slitnar. Ofta verður avtalað, at fosturforeldrini í staðin fáa ein stuðlandi leiklut, alt eftir, hvør tørvurin hjá barninum er. Á henda hátt verður hildið fast í tilknýtið, til fosturbarnið hevur fótað sær í tilveruni sum vaksin - á sama hátt sum vanligt er hjá ungdómi, ið so við og við skal taka sjálvstøðuga ábyrgd.